maður niðan á ein heygg, sum hildið verður liggur á hesum sama fjalli. Hesin var Guds sonur.

Ísakur fekk brenni at bera, Jesus fekk ein kross á herðar sínar.

Á Jesusi lá øll okkara synd og øll okkara skuld. Á Jesu ákæruriti stóð skrivað tín og mín synd.

Á heygnum Golgata, varð Jesus krossfestur sum eitt offur og eitt loysigjald fyri alla heimsins synd og skuld.

So nú eru tvey fjøll. Sinai og Golgata.

Hava bæði nú týdning fyri okkum?

Ja, bæði!

Sinai og 10 boðini eru til tess av avdúka meg sum syndara. Tað er, tað eg eri í mær sjálvum. Men tey eru eisini ætlað at læra meg at liva Gudi til æru og menniskjum at gagni.

Golgata og Jesus er hann, eg leiti við mínum byrðum fyri at fáa fyrigeving og nýggja byrjan, og Heilagi Andin er tann, sum gevur mær styrki at liva, sum eg skal.

Men hvussu verði eg frelstur?

Við at siga ja til Jesus og trúgva á hann. Geri eg tað, avnokti eg Djevulin og alt tað illi og sigi nei til alla synd í mínum lívi og vil øllum órættvísi til lívs.

Jesu deyði og uppreisn er endaligi dómurin yvir alt ilt, sum er okkum ímóti, eitt sigursróp um allan heimin, at Gud elskar okkum og hevur umsorgan fyri okkum í hesum lívi, og eftir tað vil leiða okkum inn í ein fullkomnan heim.

”Tí av náði eru tit frelstir, við trúgv, og tað er ikki tykkum at takka, tað er Guðs gáva” (Ef 2,8).

Orsøkin, at menniskju kunnu hoyra, læra og byrja at halda 10 boðini, er, at Jesus tekur búgv við Anda sínum í okkara hjørtum og gevur okkum eitt nýtt lív. Nú er lív mítt ikki um meg, men um hann, sum elskaði meg og gav seg sjálvan upp fyri meg.

### Av hjarta, sál og mátti

Hoyri nú 5. Mós 6 eina ferð enn: ”… tú skalt elska Harran, Guð tín, av øllum hjarta tínum, av allari sál og øllum mátti tínum.”

At elska Gud **av øllum mínum** hjarta merkir at liva Gudi til æru við at tæna mínum næsta við mínum viti – evnum – kenslum – lærdómi - royndum.

At elska Gud **av allari míni sál** merkir, at liva Gudi til æru við at tæna mínum næsta við tí lívi og teimum døgum, mær lutast, eisini um tað skuldi kosta mær lívið.

At elska Gud **av øllum mínum mátti** merkir, at liva Gudi til æru við at tæna mínum næsta við allari míni likamligu styrki, øllum mínum arbeiði og umsita til hansara frama mínar inntøkur og ognir.

At elska Gud er nú ikki bara við munninum at játta Jesus sum sín Frelsara og Harra, men at geva Gudi seg sjálvan við øllum, ein er og hevur fingið at umsita, til næstans gagn.

Elskar tú Gud, elskar tú næstan. Elskar tú ikki Gud, elskar tú ikki næstan, soleiðis, Gud ætlaði, at tú skuldi gera.

Hvat merkir nú tað at vera ein kristin?... at trúgva á Jesus og at fylgja honum?

Tað merkir við Guds hjálpa at elska Gud av øllum mínum hjarta, av allari míni sál og øllum mínum mátti.

Gert tú tað?

Gevur tú teg við øllum, sum tú ert, og sum tú eigur, til Guds?

---

Vitnisburður Bjarta var hesin:

*”So er tað tá vist,*
*eg frið havi funnið í tær, Harri Krist!*
*So tori eg trúgva, at Gud elskar meg,*
*at Jesusar blóð mína synd sónaði.*
*Eg halli meg at tær, eg falli á knæ*
*við Golgata tær!*

Bjarti andaðist júst langafríggjadag - næstan 80 ára gamal.

Við hesum orðum lýsa vit við virðing og tøkk frið yvir minnið um Bjarta Petersen.

Gud troysti og signi tykkum konuna, Jóna og børnini, Alfred, Jógvan og Maria við hjúnafelaga og børnum tykkara.

**Bergur D. Joensen**

*(Jarðarferðartalan við smávegis broytingum í Christianskirkjuni 14. apríl 2009)*

# Professions bachelorar sum námsfrøðingar




Hósdagin 22. januar 2009 var próvtøka á Danner Seminariet í Jægerspris í Danmark, har 23 føroyskar kvinnur tóku prógv sum professionsbachelor sum námsfrøðingar. Útbúgvingin tók trý ár sum fjarlestur, har royndir til høvuðsuppgávurnar vóru tiknar í Danmark og í Føroyum.

**Aftara rað f.v.:** Sólbjørg Fríðheim, Tórshavn, Unni Jóna Joensen, Kvívík, Randi Poulsen, Viðareiði, Lilliana Svøðstein, Klaksvík, Joan á Rógvi Johansen, Vestmanna, Gudny Petrina Mortensen, Klaksvík, Diana Jensen, Sørvágur, Emi Joensen, Tórshavn, og Rebekka Vestergaard, Sumba.

**Miðraðið f.v.:** Solveig Fagraklett, Vágur, Helen Olsen, Toftir, Kristina Sjøstein, Viðareiði, Hansy Sjúrðaberg, Klaksvík, Olga Johanna Rasmussen, Søldarfjørður, Bjørg Rasmussen, Saltangará, Diana á Skúr, Tórshavn, og Esther Gregersen, lærari.

Heidi Reidum Joensen, Vágur, Anne Kirstin Nielsen, lærari, Sigga Petersen, Klaksvík, Ingeborg Poulsen, Hvannasund, Ruth Fjalsá, Tórshavn og Eyðvør Müller, Sumba.

Á myndini vanta: Oddvør Poulsen, Vestmanna, og Guðrið Viderø Zachariassen, Sandur.

*mg*

# Grafisk framsýning í Smiðjuni

Flaggdagin 25. apríl verður framsýning av grafiskum verkum í Smiðjuni í Lítluvík.

Í vetur hevur anda av arbeiðs-og lærihugi í húsunum hjá Tórshavnar Kommunu í Kongagøtu.

Á ovastu hædd hevur Jónu Rasmussen grafikari húsast við sínum grafikknæmingum. Arbeitt hevur verið við nógvum ymiskum: Linoliumskurði, træskurði, etsingum, aquatintum, foto litografi, steinprenti og nógvum øðrum grafikki.



Við Jónu, sum hollum ráðgeva og lærara, hava næmingarnir ekperimenterað og roynt ymisk ting, ið eisini eru ein møguleiki innan grafikkin. Hvørja ferð onkur hevur havt hug at royna okkurt, og hevur spurt ”Jóna, kann man?”, so hevur svarið verið tað sama ”Royn og vita hvat hendir”.

Hesum er komið nógv spennandi burturúr, og hava næmingarnir tí tikið ta avgerð, at sýna úrslitini av vetursins arbeiði fram í Smiðjuni í Lítluvík.

Hetta er ein sera fjølbroytt samling av grafiskum verkum. Møguleiki verður at keypa verkini, um hugur er til tess.

Fernisering verður Flaggdagin kl.16. Opið verður eisini sunnudagin 26. og mánadagin 27. apríl frá kl. 14–18.